








# Alt til heimið og byggivinnuna




Bygma Balslev í Hoyvík er ein gomul kend fyritøka við trimum deildum við øllum til byggivinnuna, handverkaran og privata kundan.

Fyritøkan Balslev, sum varð stovnað í 1906 í Keypmannahavn, hevur verið í Føroyum síðan 1927.

Fyrstu árini úti í Tinganesi og seinni við Eystaru bryggju til 1979, tá fyritøkan flutti til Hoyvíkar. Tíggju ár seinni lat Byggibúðin upp, sum tann fyrsti handilin av sínum slagi í Føroyum.

Byggibúðin er ein megastórur handil við stórum vøruúrvali og góðum plássi hjá kundunum at hyggja seg um í. Byggibúðin hevur øll amboð umframt skrúvur, máling, køkar, elbúnýti, lampur, klæði eins trygdarklæði og trygdarskógvar. Garðsbúðin við øllum til urtagarðin er ein partur av Byggibúðini.

Timburdeildin hjá Balslev hevur alt, ið skal til fyri at byggja eini hús sum t.d.: timbur, vindeygu, hurðar, besløg, bjálving og sement. Fyri at lætta um hjá handverkarunum var Handverkarabúðin, sum er opin millum 8 og 17 vanligar gerndisdagar, sett á stovn.

Balslev er í dag ein leiðandi fyritøka á sínum øki og heldur til á umleið 24.000 fermetrum, har umleið 6.500 eru undir taki. Hjá Bygma Balslev fæst snøgt sagt alt til heimið, handverkaran og byggivinnuna umframt ein hópur av jólagávuhugskotum.